

*HB leikararnir fegnast saman við málskjúttanum, Símuni Samuelsen, eftir at hann í evstu løtu sendi reyð/svørta havnarliðið á sigurskós*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Gundadalur 20. juli 2010, kl. 17.00

**HB - Red Bull Salzburg** 1-0 (0-0)

**1-0 Símun Samuelsen, 73.**
Dómari: Tony Asumaa, Finnland

**HB:** Tórður Thomsen - Pætur Jørgensen, Rógvi Holm, Tórður Hreiðarsson, Hendrik Rubeksen - Símun Samuelsen, Fróði Benjaminsen, Vagnur Mohr Mortensen, Levi Hanssen, Rógvi Poulsen - Andrew av Fløtum (Kristin R. Mouritsen 88)
***Gul kort:*** Símun Samuelsen, Vagnur Mohr Mortensen og Andrew av Fløtum

**Salzburg:** Alexander Walke – Milan Dudic, David Mendes da Silva (Nikola Porkrivac, 34.), Gonzalo Zarate, Jakob Jantscher (Louis Ngwat-Mahop, 71.), Franz Schiemer, Andreas Ulmer, Simon Cziommer (Dusan Svento, 46.), Stefan Hierlander, Ibrahim Sekayga, Christoph Leitgev.
***Gult kort:*** Christoph Leitgev

# HB tamdi reyða tarvin

**CHAMPIONS LEAGUE** Teir eita einki minni enn Red Bull Salzburg, eftir heimskenda orkudrykkinum og teir hólvaðu HB av í Red Bull Arena. Men í gjár vísti HB, at skerpikjøt og seyðarhøvd eisini kunnu geva orku. Tá avtornaði skuldi HB eisini havt hólvað Red Bull Salzburg av, men neyvleikin manglaði framman fyri málinum

Tróndur Arge

Tá tú hevur tapt fyrra dystin 5-0, so er ringt at skapa nakran stemning til seinna dystin. Tí valdi HB at bjóða til ókeypis Champions League fótbólt í Gundadali. Tað blandaðu teir við einum framúr innsatsi, sum endaði við einum frálíkum 1-0 sigri til føroyska liðið.

– Tað er framvegis ov nógv at tapa við fýra málum samanlagt, men eg eri nøgdur við avrikið og dystin í dag. Munurin á dystinum í dag og tí fyrra er, at vit trúgva upp á tað og spæla sum eitt lið. Vit gera vøllin lítlan fyri teir og standa tætt saman og geva teimum lítið pláss. Teir spældu seg sjáldan gjøgnum verjuna hjá okkum, og eg haldi, at vit vunnu uppiborið, sigur HB framherjin Andrew av Fløtum.

## Hví er munurin so stórur?

HB vísti frá byrjan, at teir vóru ikki komnir á vøllin fyri at leggja kongin. Teir stríddust manniliga og serliga liðskiparin, Fróði Benjaminsen, og miðverjarnir báðir, Rógvi Holm og Thordur Hreidarsson, løgdu nógv fyri í nærdystinum. Men hví er tað so stórur munur á innsatsinum og dystinum í dag í mun til tann á Red Bull Arena?

– Vit høvdu ov stóra virðing fyri teimum tá og ein manglandi trúgv upp á okkum sjálvar. Vit halda at vit ikki duga at spæla fótbólt, men í dag prógva vit at vit duga. Vit vóru sjálvandi ikki líka troyttir í hálvleikinum her sum í 33 hitastigum í Eysturríki. Vit arbeiða hart í dag og trýsta teir langt frammi á vøllinum og royna at spæla okkara spæl, men bara á ein meir verjukendan hátt, sigur Andrew av Fløtum.

## Okkara spæl framyvir

HB hevur næstan á hvørjum ári verið við í teimum evropeisku kappingunum, men tað hevur enn ikki eydnast teimum at spæla seg víðari yvir tveir dystir. Stundum hava útidystirnir kostað dýrt, har tapini eru blivin alt ov stór.

– Tað hevur ikki altíð gingið so væl hjá okkum í Evropa, men nú er tíðin komin til at vit spæla okkara spæl, sigur Andrew av Fløtum.

HB hevði í dystinum fleiri góðar møguleikar at skora. Einu ferðina kom Andrew sjálvur at standa púra leysur í brotsteiginum, men málmaðurin kom út og varði fyri. Thordur Hreidarsson stútaði eisini væl stutt fyri málið, men málmaður hjá Red Bull Sazlburg stórbjargaði. Seinastu løtuna av dystinum hevði HB upp til fleiri vandatøður, har teir kundu økt um leiðsluna.

– Tú brennur næstan altíð fleiri møguleikar, enn tú skorar uppá, og vit hava nakrar í dag, men millum annað eg brenni ein stóra møguleika. Trupulleikin hjá okkum er, at vit skulu út at minimera tapini á útivølli, so vit ikki skulu vinna 6-0 á heimavølli, staðfestur Andrew av Fløtum til seinast.

## Tað ber til at vinna á sterkari mótstøðu

Hóast tað ongantíð var nakar ivi um hvør kom víðari, so megnaði HB at skapa ein góðan og spennandi dyst bæði fyri seg sjálvar og teir lutfalsliga nógvu áskoðararnar. Føroyskur fótbóltur manglar enn nógv fyri at kunna koma víðari úr fyrsta undanumfarinum við jøvnum millumbilum, men HB prógvaði at tað letur seg gera at vinna á størri og sterkari mótstøðu.

*trondur@sosialurin.fo*

## Símun Samuelsen:

## *Vit eru eitt sindur aftanfyri Ísland*

– Vit vildu vísa, at 5-0 ikki var munurin á liðnum og tað prógvaðu vit í dag. Teir hava kanska ein møguleika, meðan vit hava einir fýra stórar møguleikar. Virðingin fyri teimum var ov stór og tað er ikki tað sama at spæla í Gundadali og so á einum stórum leikvølli í Eysturríki. Tað skuldi verið umvent, soleiðis at vit eru



meira uppsettir at spæla á útivølli á einum stórum leikvølli, sigur Símun Samuelsen.

**Hvat kann gerast øðrvísi fyri at fáa betri úrslit á útivølli?**
– Ein møguleiki er at fara avstað áðrenn, soleiðis at leikararnir fáa møguleikan at venja seg við hitan, sum ofta ger um seg, tá spælt verður á útivølli. Tað hevði kunnað givið nógv betri úrslit, sigur Símun Samuelsen.

**Er tað munur á íslendskum liðum í Evropa og so føroyskum liðum í Evropa?**
– Hugburðurin hjá íslendingum er eitt sindur øðrvísi. Har koma eitt ella tvey lið víðari at kalla hvørt ár, so teir eru eitt sindur frammanfyri okkum á tí økinum. Eisini á tí likamliga økinum eru teir eitt vet framman fyri okkum, staðfestir Símun Samuelsen at enda.

*trondur@sosialurin.fo*